# Jákup helt málið púra tætt

*Herfølge stóð seg best av donsku liðunum í UEFA Cup, og nú bendir alt á, at teir fara at halda fram í kappingini*

Í gjár hvíldu teir í Herfølge seg. Tað høvdu teir væl uppiborið, og tað er ikki at undrast á, at lagið verður sera gott, tá FCMidtjylland kemur at vitja í morgin. Spurningurin er bara, um Jákup Mikkelsen og liðfelagarnar hava fingið løtt battaríini aftur og savna tankarnar, eftir at teir hóskvøldið stóðu seg ógvuliga væl í UEFA Cup.

Herfølge var í Stokholm og spældi á tjóðarleikvøllinum, Råsunda. Mótstøðuliðkið var AIK, og tað fór kring alt Europa, at Herfølge hevði á útivølli vunnið 1–0. Málið fingu teir miðskeiðis í 1. hálvleiki, og tað var Jesper Falck, sum eftir ein stikkbólt fram ímillum lyfti hegnisliga upp um málverjan, Daniel Andersson, sum var á veg úr AIK málinum. Burtursæð frá teimum umleið hálvt hundrað Herfølge áskoðarunum, so gjørdist tað deyðatøgn ímillum teir 7.159 áskoðararnar.

Dysturin í Herfølge verður 28. september ella sama dag sum danir skulu gera av, um teir vilja hava evruna ella ikki. Tveir av stjørnuspælarunum hjá AIK, Andreas Andersson og Pontus Kålmark vóru skaddir hóskvøldið, og tað vóru tríggir aðrir stuðulsspælarar hjá IK eisini.

Men hóast hetta so verður mett, at Jákup og teir hava góðar møguleikar:

– Vit spældu akkurát, sum vit gjørdu í fjør, tá vit vunnu DM. Allir stríddust fyri allar. Vit vunnu nærdystirnar, og teir komu til ógvuliga fáar møguleikar, var mettingin hjá John Faxe Jensen, sum ikki minst rósti miðverjuni og málverjanum, Jákupi Mikkelsen, fyri teirra stóra leiklut í tepra sigrinum.

– AIK hevði fáar upplagdar møguleikar, men tað tænir teimum aftastu til stórt rós, so tryggir teir vóru, segði venjarin, sum harvið eisini undirstrikaði, hvussu stóran týdning fótbóltsspælið hjá Jákupi hevur, tá tað verður spælt nógv aftur til málverjan.

Fyrr í summar varð Herfølge sent úr undankappingini til meistarakappingini. Herfølge tapti tvær ferðir 3–0 til Glasgow Rangers. Tað varð ikki mett at vera nakað serligt úrslit, tí Glasgow hevur tey seinnu árini bara verið eitt miðal europeiskt lið. Men í vikuni undirstrikaðu teir í Glasgow, at teir ætla sær ikki so lítið í ár. Á heimavøllinum vunnu teir 5–0 á eysturríkska Sturm Graz, og tað var ikki so lítið.

*Í Herfølge eru tey nú til reiðar at taka ímóti AIK Stockholm, og við sigrinum í fyrra dystinum, er útgangsstøði hjá Jákupi og teimum gott*



### Stórt vónbrot

Trý onnur donsk lið vóru í altjóða ódnarveðrið hóskvøldið. Brøndby var einasta liðið á heimavølli, og teir vóru størsta vónbrotið. Osijek úr Kroatia, sum ikki verður mett at hava nakra serliga styrki, vann 2–1 á Brøndby stadion. Sigursmálið fingu kroatisku gestirnir eftir eitt óvanliga stórt málverjumistak. Eftir afturlegging legði Mogens Krogh bóltin fyri føturnar á einum av álopsmonnunum hjá gestunum.

AB, sum sendi B36 úr UEFA Cup, var í Prag í Kekkia, og har gekk teimum illa. Dukla Prag vann 3–0, og harvið tykist dreymurin hjá AB um framhald í UEFA Cup at vera lítið veruleikakendur.

Burtursæð frá Herfølge stóð Viborg seg best av donsku liðunum. Viborg er fyri fyrstu ferð við í europeiskum kappingum. Teir vóru í Moskva og spældu ímóti CSKA, og úrslitið var 0–0.

JH


## Jubileumsdagar

**40 ára jubileum við BERNINA®**
**halda vit við sera góðum tilboðum!!!**

Frá 20. - 23. september hava vit vitjan av stjóranum í BERNINA DANMARK A/S Steen Jensen og demonstratrise Tine Søgård sum fer at demonstrera okkara stóra úrval av BERNINA seymimaskinum og overlockarum í handlinum. Allar dagar verður bjóðað kaffi og smákøkur til kundarnar.

**Artista 180 + broderimodul + ARTlink/CPS special edition**
Tann ultimativa seymimaskinan við broderífasilitetum.
Vanligur prísur kr. 27.490,00
**Jubileumstilboð kr. 20.995,-**

**Sparið kr. 1.000,-**
**BERNINA 140** Vanligur prísur kr. 8.195,-
**Jubileumsprísur kr. 7.195,-**

**Bernina 2500 DCET**
er tann mest framkomna overlock-maskinan við bæði 2 og 3 nála coverseymi, Top & Bottom coverseymi og 12 overlockseymum - alt hetta í einari maskinu.
Vanligur prísur kr. 15.995,-
**Jubilemumsprísur kr. 12.995,-**

**OKKARA MEST SELDA OVERLOCK maskina**
**Bernette 800 D** Vanligur prísur kr. 5.795,-
**Jubileumsprísur kr. 4.995,-**

Sosialurin - 311820

**SP/F MARJUN HEIMÁ**
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19


## Úrslitini úr UEFA-Cup í vikuni

Basel-Brann 3-2 (1-0)
Dmovice-1860 München 0-0
Ghent-Ajac 0-6 (0-2)
Kosice-Grazer AK 2-3 (0-0)
Lierse-Bordeaux 0-0
IFK Norrkøping-Slovan Liberec 2-2(1-0)
Rapid Wien-Ørgryte 3-0 (2-0)
Vasas-AEK Athen 2-2 (0-0)
Al. Vladikavkaz-Arnica Wronki 0-3 (0-1)
AIK Solna-Herfølge 0-1 (0-1)
Alaves-Gaziantepspor 0-0
Antalyaspor-Werder Bremen 2-0 (1-0)
Brøndby-Osijek 1-2 (1-1)
CSKA Moskva-MTK Hungaria 1-2 (1-0)
Celta Vigo-Rijeka 0-0
Celtic-HJK Helsinki 2-0 (2-0)
Chelsea-St Gallen 1-0 (1-0)
Club Brügge-APOEL Nicosia 1-0 (2-0)
Dunaferr-Feyenood 0-1 (0-0)
Gorica-AC Roma 1-4 (1-3)
Guegnon-Iraklis 0-0
Halmstads-Benfica 2-1 (1-1)
Kryvbas Kryvyi-Nantes 0-1 (0-0)
Lausanne-Sport-Torpedo Moskva 3-2 (1-2)
Leicester City-Crvena Zvezda 1-1 (1-1)
Lillestrøm-Dinamo Moskva 3-1 (2-1)
Lokomotiv Moskva-Neflochirnik 4-2 (2-1)
Molde-Rayo Vallecano 0-1 (0-1)
Napredak-OFI Crete 0-0
Olimpija Ljubljana-Espanyol 2-1 (2-1)
PAOK Thessaloniki-Beitar Jerusal. 3-1 (1-1)
Partizan-Porto 1-1 (1-0)
Pobeda-Parma 0-2 (0-1)
Polonia Warsawa-Udinese 0-1 (0-0)
Rapid Bucharest-Liverpool 0-1 (0-1)
Real Zaragoza-Wisla Krakow 4-1 (1-1)
Roda-Inter Bratislava 0-2 (0-1)
Ruch Chorzow-Inter 0-3 (0-0)
Slavia Prag-AB 3-0 (1-0)
Slovan Bratislava-Dinamo Zagreb 0-3 (0-1)
Stuttgart-Heart of Midlothian 1-0 (1-0)
Tirol Innsbruck-Fiorentina 3-1 (2-0)
Vitesse Arnheim-Maccabi Haifa 3-0 (1-0)
Vorskla Poltava-Boavista 1-2 (1-0)
Zimbru Chisinau-Hertha Berlin 1-2 (1-1)
Zurch-Genk 1-2 (0-0)



# Seinasta útkall hjá FSV

*Fáa vágamenn ikki trý stig burtur úr dystinum sunnudagin, er lítið sannlíkt, at teir eiga umboðan í bestu deildini komandi ár*

Jákup Mørk

Somikið greiðar eru treytirnar, nú sandoyingar koma vestur at dystast sunnudagin.

Á heimaliðinum eru teir eisini fullgreiðir um álvarsligu støðuna, og spurningurin er so, um teir eru til reiðar at taka dystin upp.

### Situr í høvdinum

- Spurningurin er í stóran mun, um vit mentalt eru til reiðar at spæla ein somikið týdningarmiklan dyst. Orðini eigur Albert Ari Thomassen, sum umframt at vera liðskipari, eisini er mest royndi leikarin hjá vágamonnum.

- Vit vita allir, hvat stendur upp á spæl, men hinvegin, hevur hvørki spæl ella úrslit verið nøktandi í seinnu kappingarhálvu, men hetta skal so betrast sunnudagin, heldur Ari.

Hann sigur annars, at vágamenn hava so at siga allar mans tøkar undan dystinum. Tór-Ingar Akselsen fekk skaða, tá vágamenn fyri einum mánaði síðani spældu móti B36, og síðani tá hevur hann ikki verið við.

Hesa vikuna hevur hann tó vant nakað, men hóskvøldið var ikki greitt, um hann fór at vera á vøllinum sunnudagin.

Vágamenninir vóna tó, at unga stjørnuskot teirra verður til reiðar at tørna út, tí hóast hann ikki fær verið í fyllari dystarvenjing, er einki at taka seg aftur í, at hann er besta kort teirra í framrættaða spælinum, og hetta er júst tað, sum vágamenn hava tørv á. Ein javnleikur er snøgt sagt ov lítið, orsakað av innahýsis úrslitunum í dystunum móti sumbingum.

### Fara eftir stigunum

Sandoyingar eru eisini fullgreiðir um týdningin, sum dysturin hevur fyri vágamenn, og teir ætla sær so avgjørt ikki at taka nakað fyri givið, áðrenn farið verður á vøllin.

- Hetta er seinasta útkall hjá teimum, so lætt verður tað undir ongum umstøðum. Tað hevði tó eisini verið ógvuliga naivt av okkum, um vit tóku lætt upp á nakran dyst yvirhøvur, sigur liðskiparin hjá B71, Eli Hentze.

Eitt er, at hetta er seinasta útkall hjá vágamonnum, men sandoyingar skulu hinvegin heldur ikki kenna seg ov tryggar. – Tað skal vilja ófatuliga illa til, um so er, at vit flyta niður, men so leingi møguleikin er á pappírinum, so er hann altso har, heldur Eli, og leggur dent á, at teir ætla sær trý stig sunnudagin.

- Tað gera vit hvørja ferð vit fara á vøllin, men at so ikki hevur eydnast so væl, er ein onnur søga, sigur liðskiparin hjá B71.

Eisini hjá gestunum eru so at siga allir mans tøkir. Jón Brekku hevur sitið sítt leikbann av sær, og er tí til reiðar at fara aftur á aftasta mannin, so líkt er til, at talan verður um á leið sterkastu uppstilling.

Einasta undantakið tykist vera Alex Nielsen. Hann hevur havt onkran snudd í knænum, og tá vit frættu av Sandi, var ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla sunnudagin.



*Skal FS Vágar yvirliva, er neyðugt hjá teimum at vinna á B71 í morgin*

# Todi Jónsson verður tøkur

*Men í gjár var ikki greitt, um hann verður á liðnum, tá OB í morgin vitjar í Parkini*

OB fer í morgin at vitja FCK á heimavøllinum í Parkini. Fyrrverandi FCK venjarin, Kim Brink, er stjóri í OB, og Carsten Hemmingsen, sum inntil fyri tveimum vikum síðani var miðvallari í FCK, er nú miðvallari í OB. Johan B. Hansen, sum fyri tveimum vikum síðani sat á beinkinum á føroyska landsliðnum, er eisini í hópinum hjá OB. Luturin hjá honum hevur higartil verið at sita á beinkinum og at koma á vøllin við hvørt.

Ein av stóru spurningunum í FCK hevur í vikuni verið, um Todi Jónsson fór at vera førur fyri at spæla sunnudagsdystin.

Sambært almennu heimasíðuna hjá FCK, so er Todi Jónsson tøkur aftur. Hann og nýggi og stóri álopsmaðurin, Pascal Simpson, hava síðani tíðliga í vikuni vant saman við hinum í FCK. Um Todi verður ímillum teir fyrstu ellivu, um hann verður á beinkinum, ella um hann verður spardur inntil annan sunnudag, tá FCK skal til Silkeborg, var ikki greitt, tá vit høvdu samband til Danmarkar.

JH



*Væntandi verður Todi Jónsson aftur klárur at spæla um vikuskiftið, eftir skaan hann fekk í landsdystinum*





petur & petur • 320870

**Okkara vitan er tín trygd**
**- tá íløgan skal gerast**

Føroya Banki hevur nú møguleika at bjóða tær at taka lut í keyp og sølu á altjóða virðisbrævamarknaðunum.

Føroya Banki hevur tikið upp samstarv við íløgufelagið Bank-Invest, ið er millum elstu og størstu fyritøkur av sínum slag í Danmark.

Eitt íløgufelag, ið er eitt felag, har fleiri íløgufólk ganga saman, er ein góð loysn hjá fólki, ið hava eitt ávíst avlopsgjaldføri og ynskja virkna røkt av íløgunum, men hava ikki tíð og orku ella innlit í virðisbrævahandil.

Í Føroya Banka er tín íløga í hondum hjá fólki við sakkunnleika innan virðisbrævahandil. Tí er okkara vitan tín trygd, tá íløgan skal gerast.

Er hetta nakað fyri teg, er tú vælkomin at seta teg í samband við fíggjardeild bankans.

FØROYA BANKI
Húsagøta 3 • Postboks 3048 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 13 50 • Fax 31 58 50
e-mail: fbk@post.olivant.fo • www.foroyabanki.fo